Eik

Kringvarp Føroya
Postboks 1299
Norðari Ringvegur
FO-100 Tórshavn

Tórshavn, 20. juni 2016

Journal nr :
Okkara ref. :
Tykkara ref. :

Stjórnarskrivstovan

Eik Banki P/F
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO-110 Tórshavn

Tel.: 348000
Fax.: 348800

office@eik.fo
www.eik.fo

Swift: EIKB FO TF
Pf. skr. nr.: 5534

**Kæra til Kringvarp Føroya um sjónvarpssendingina "Skattamálið" – send 24. mai 2016 – sum eisini fevnir um onnur tíðindainnsløg í Kringvarpinum við tilknýti til sendingina.**

Undirritaði letur við hesum Kringvarpi Føroya kæru um sjónvarpssendingina "Skattamálið", sum var send í Kringvarpinum 24. mai 2016. Kært verður eisini um tíðindainnsløg í Kringvarpinum, sum hava tilknýti til sendingina. Kæran verður latin Kringvarpinum sambært lóg um fjølmiðlaábyrgd, grein 34, stk. 3.

**KÆRA**

Sjónvarpssendingin, "Skattamálið", ið var send í Kringvarpi Føroya týskvøldið 24. mai 2016, sum í høvuðsheitum var grundað á ónevndar keldur og bert ein brøkpart av tilfarinum í einum umfatandi máli um skattafrádrátt, var skaðandi og niðrandi fyri Eik Banka og leiðslu bankans.

Málið snýr seg um eina fakliga ósemju um ein skattafrádrátt, men Kringvarpið hevur kortini fingið eitt heilt annað mál burturúr. Við støði í ónevndum keldum og eftir øllum at døma einum avmarkaðum innliti í málsgongdina, skjølini í málinum og sakkunnleikan, sum krevst í skattamálum, hevur Kringvarpið í almenna rúminum flutt málið frá at vera eitt mál um skattafrádrátt til at vera eitt mál um møguligt skattasvik og villleiðing av TAKS.

Í sendingin verður málið viðgjørt uttan haldgóðar keldur og uttan nøktandi kelduvandni, og soleiðis hevur málið eisini verið viðgjørt í fleiri umførum í tíðindaflutninginum hjá Kringvarpinum m.a. í samstarvi við Miðlahúsið. Í hesum sambandi verður víst a, at ein journalistur í Miðlahúsinum er einasta talandi kelda, sum er tikin upp til sendingina, og hennara leiklutur tykist vera at sáa so nógvan iva sum gjørligt um leiklutin hjá Eik í skattamálinum.

Tað er undranarvert, at eingin serfrøðingur luttekur í sendingini í einum so tungum máli. Tað eyðkennir viðgerðina av málinum, at tað bert eru tveir journalistar – journalisturin, sum ger sendingina, og journalisturin, sum arbeiðir við málinum í Miðlahúsinum – ið gera metingar, niðurstøður og samanumtøkur, hóast teir ikki hava serkunnleika á økinum.

Sum heild verður málið viðgjørt úr sjónarhorninum hjá tí partinum, sum er ímóti skattafrádráttinum – t.e. við øðrum orðum úr sjónarhorninum hjá Jørn Astrup Hansen, sum áður hevur umboðað Finansiel Stabilitet í nevndini hjá Eik. Tað er eyðsæð, at Jørn Astrup Hansen fóðrar journalistin, sum hevur gjørt sendingina og flestu tíðindainnsløgini um málið, tí at tað eru júst hansara sjónarmið, sum áhaldandi ganga aftur. Kelduvandnið mótvegis hesi høvuðskelduni hjá Kringvarpinum er út av lagi, tí høvuðskeldan verður ikki roynd í interviewstøðum við ágangandi og atfinningarsomum spurningum. Journalisturin tykist trúgva fult og heilt útleggingin

hjá Astrup av málinum. Tulkingar og niðurstøður hjá journalistinum taka sostatt støði í bert einari síðu av sakini.

Samstundis hevur tað stóran týdning fyri journalistin at sleppa framat leiðsluni í Eik við ágangandi og atfinningarsomum spurningum. Í veruleikanum er talan um eitt trúnaðarmál, tí tað snýr seg um skattaviðurskifti hjá einum løgfrøðiligum persóni, Eik Banka, sum bankin ikki hevur skyldu til at viðgera í fjølmiðlunum. Tá málið so kortini er komið út í almenna rúmið, hevur leiðslan í Eik roynt at svarað spurningum frá Kringvarpinum í tíðindaflutninginum um hetta torgreidda málið. Men eftir at hava staðfest, at journalisturin viðger málið úr bert einum sjónarhorni uttan nøktandi fakligt innlit og grundarlag, samstundis sum hann helst er tongdur at høvuðskelduni, hevur leiðslan valt at svara spurningum frá journalistinum skrivliga fyri í mest møguligan mun at tryggja sær, at hetta torskilda málið ikki heldur fram sum ein orðavavstur. Sostatt er vantandi álit á journalistin og hansara viðgerð av málinum orsøkin til, at umboð fyri Eik ikki vilja vera við á upptøkum í sendingini.

Eik svaraði kortini skrivliga 17 spurningum til sendingina, men bert ein evarska lítil partur var tikin við í sjónvarpssendingina. Kringvarpið valdi í staðin at leggja hesar spurningar og svar út á heimasíðuna í fullari longd. Spurningar í torgreiddum málum avleiða ofta longri svar enn vanligt, sum sjálvsagt eiga at vera borin fram í somu sending, har mótstríðandi sjónarmiðini verða lýst. Men í hesum føri vildi journalisturin ikki taka svarini við í sendingina, tó at tey vóru sera viðkomandi fyri tey uppáhald, sum vóru borin fram í sendingini. Tað er ikki tráð við góðan fjølmiðlasið, at svarini til uppáhaldini og spurningar, sum verða reistir í einari sending, verða svarað á øðrum miðli á netinum, har tað er sannlíkt, at bert fáir hyggjarar fara at leita eftir svarinum. Hóast fjølmiðilin í báðum førum er Kringvarp Føroya, so er talan um tveir ymiskar miðlar undir sama stovni – sjónvarp og heimasíða. Um hyggjarin skal kunna gera sær eina javnvigandi mynd av málinum, so eigur hann at fáa svarini í somu sending, har mótstríðandi spurningar og uppáhald verða borin fram.

Myndaviðgerðin í sendingin er eisini manipulerandi. Myndir, sum lýsa heilt vanligar støður, har fólk hittast á fundi ella t.d. av góðum grundum bera seg undan einum journalisti ella myndfólki, verða sýndar í seingongd við tí greiða endamáli at sáa iva um persónarnar á myndunum. Soleiðis eru myndirnar við til at stuðla upp undir sjónarhornið, haðani journalisturin velur at lýsa málið.

Bæði Eik Banki og leiðslan í Eik hava fingið eina órættvísa viðferð í sendingini "Skattamálið", sum í fleiri førum ber ósannindi út í almenna rúmið, og sum í øðrum førum í sjálvum framburðinum og viðgerðini av málinum geva eina skeiklaða mynd av hesum torgreidda máli. Talan er um fleiri brot á Leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið, sum ítøkiliga verður víst á í gjøgnumgongdini av sendingini niðanfyri.

| Tíð | Orðingar í sendingini | Brot á "Leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið" |
|---|---|---|
| **00:13** | Citat frá ónevndari keldu: "*eg kann ikki standa á síðulinjuni, meðan Eik Banki á alljósum degi roynir at ræna føroyska skattgjaldaran - eg eri bangin fyri tað ikki fær avleiðingar*" | Serliga grov skuldseting frá ónevndari keldu, sum ikki verður eftirkannað í sendingini. |
| **01:00** | "*Eik lumpaði TAKS*" endurgivið úr Sosialinum. | Sendingin hevur einki grundarlag at bera skeivleikar víðari úr Sosialinum. Talan er um eitt uppáhald, sum ikki verður skjalprógvað, og hetta eigur at verða rættað. |

| | | |
|---|---|---|
| **01:46** | Journalisturin: "*Hvussu tað eydnaðist Eik at fáa føroyskar skattamyndugleikar at játta teimum ein skattafrádrátt á næstan 100 milliónir krónur.*" | Grov skuldseting, har journalisturin leggur Eik undir at hava roynt at lumpa ein skattafrádrátt burtur úr skattamyndugleikunum. |
| **05:05** | Journalisturin: "*Tá skattamálið kom fram, tók TAKS málið upp til nýggja viðgerð.*" | Skeiv upplýsing. Eik bað TAKS hyggja at málinum umaftur. |
| **08:53** | "*Eik lumpaði TAKS*" endurgivið úr Sosialinum. | Sendingin hevur einki grundarlag at bera skeivleikar víðari úr Sosialinum. Talan er um eitt uppáhald, sum ikki verður skjalprógvað, og hetta eigur at verða rættað. |
| **09:54** | Citat frá ónevndari keldu: "*eg kann ikki standa ásíðulinjuni, meðan Eik Banki á alljósum degi roynir at ræna føroyska skattagjaldaran - eg eri bangin fyri tað ikki fær avleiðingar*". | Serliga grov skuldseting frá ónevndari keldu, sum ikki verður eftirkannað í sendingini. |
| **11:25** | Upplestur: "*Tá Fíggjarligt Støðufesti yvirtók Eik, høvdu stundir ikki verið at gjørt bøkurnar hjá gamla bankanum upp*". | Skeiv upplýsing. Fíggjareftirlitið hevði gjørt uppgerð fáar vikur frammanundan. |
| **11:34** | Upplestur: "*Milliardirnar báðar skuldu nýtast til tvey endamál: at stovna ein nýggjan banka og at rinda rokningar í gamla Eik*". | Skeiv upplýsing. Eik Banki hevur ikki rindað nakrar rokningar í gamla Eik. |
| **12:22** | Upplestur: "*KPMG orðaði skattligu treytirnar, sum fylgdu við Eik.*" | Skeiv upplýsing. Tað ber snøgt sagt ikki til at orða skattligar treytir. Skattligar treytir eru bert ásettar við lóg - í hesum føri føroysku skattalóggávuni. |
| **12:49** | Upplestur: "*Hetta merkir, at skatturin hjá Eik skal roknast við støði í byrjanarjavnanum, sum sambært almenna roknskapinum var 1,5 milliard krónur.*" | Skeiv upplýsing. 1,5 milliard, sum víst verður til, er endaliga úrslitið, eftir at uppruddingin er farin fram inni í nýggja bankanum. Talan er um eina roknskapartekniska uppgerð. Bankin byrjar framvegis við 2 milliardum í eginpeningi. |
| **14:05** | Upplestur: "*At tapið verður bókað í 3. ársfjórðingi 2010 merkir, at tapið hoyrir til tíðina hjá gamla Eik.*" | Skeiv upplýsing. Uppáhaldið er í stríð við bæði keypsavtaluna, partafelagsreglurnar, skattareglurnar og roknskaparreglurnar. Tað ber ikki til at bóka tap í einum felag, sum er staðfest í einum øðrum felag, og tað er heldur ikki farið fram. |

| | | |
|---|---|---|
| **14:26** | Upplestur: "*Hetta skrivaði Eik í frágreiðingini Eik í 2010. (...) Í dag vil Eik ikki kennast við frágreiðingina*". | Skeiv upplýsing. Eik hevur onga slíka frágreiðing greitt úr hondum. Misvísandi orðing, tá sagt verður, at "í dag vil Eik ikki kennast við frágreiðingina". Tað er eitt faktum, at frágreiðingin var ongantíð samtykt í nevndini, og tí er og verður hon ein privat kladda hjá Jørn Astrup Hansen |
| **15:39** | Upplestur: "*Í dag vil Eik tó heldur ikki kennast við hetta skjalið*". | Skeiv upplýsing. Misvísandi orðing, tá sagt verður, at "í dag vil Eik tó heldur ikki kennast við hetta skjalið". Skjalið finst ikki í bankans skjalagoymslum, og tí er og verður hetta eitt privat skjal hjá Jørn Astrup Hansen. |
| **16:08** | Upplestur: "*Men onkuntíð í 2011 ella 2012 broytti bankin støðu og fór at ganga beint ímóti teimum skattligu treytunum, sum bankin eina ferð hevði góðtikið*". | Skeiv upplýsing. Misvísandi orðing, tí skattligar treytir eru bert ásettar við lóg, og tí kann bankin ikki velja annað enn at halda seg til lógina. |
| **18:30** | Upplestur: "*Henrik Barner staðfesti, at tað hevði Eik gjørt í síni sjálvuppgávu*". | Skeiv upplýsing. "Henrik Barner staðfesti" er ein skeiv og misvísandi umseting og tulking av nevndarfrágreiðingini, har tað stendur, at Henrik Barner "var enig". |
| **20:45** | Upplestur: "*Og sambært almenna roknskapinum byrjar Eik við 1,5 milliard krónum*". | Skeiv upplýsing. 1,5 milliard, sum víst verður til, er endaliga úrslitið, eftir at uppruddingin er farin fram inni í nýggja bankanum. Talan er um eina roknskapartekniska uppgerð. Bankin byrjar framvegis við 2 milliardum í eginpeningi. |
| **22:59** | Upplestur: "*Skattamálið hjá Eik er eindømi*". | Skeiv upplýsing. Støðan var á leið tann sama, tá Fionia Bank fór av knóranum. Tí er skeivt at umrøða skattamálið hjá Eik sum eindømi. |
| **25:13** | Upplestur: "*Ikki bara ósemjur, men eisini hóttanir vóru frammi á fundinum*". | Skeiv upplýsing. Ongar hóttanir hava verið frammi á fundum um hetta málið, soleiðis sum sakliga er greitt frá i nevndarfrágreiðingini. |
| **27:32** | Upplestur: "*Hetta merkir í veruleikanum, at hann situr yvir nevndini í Eik, sum annars skal geva honum mótspæl. (...) Tann einasti, sum er yvir Súna Schwartz Jacobsen í samtakinum er nevndarformaðurin í Ognarfelagnum, Arni Brattaberg*". | Skeiv upplýsing. Súni Schwartz Jacobsen er forstjóri í TF Holding, men tað er skeivt at siga, at hann situr yvir nevndini í Eik. Nevndin í Eik verður vald av nevndini í TF Holding. Sum forstjóri í TF Holding vísir SSJ til nevndina í TF Holding, og í Eik vísir hann til nevndina í Eik. Hann vísir sostatt til tvær ymiskar nevndir og situr sostatt ikki omanfyri nevndina i Eik. Tað er skeivt at blanda stjórastarv og nevndir saman. |

| | | |
|---|---|---|
| **28:24** | Upplestur: "*Og sleppur tú ikki at sita í nevndini í Eik, so eru eisini aðrir møguleikar, tí í TF samtakinum er ein hópur av feløgum við nógvum gyltum nevndarsessum, og ofta ganga somu persónar aftur í hesum sessum*". | Skeiv upplýsing. Myndin vísir yvirlit yvir øll feløgini í TF Holding samtakinum samstundis sum sagt verður at "*í TF samtakinum er ein hópur av feløgum við nógvum gyltum nevndarsessum*". Eingin nevnd er í TF Ognir ella TF Íløgur. Meirilutin av nevndarlimunum í Inni, Betri pensjón og FIC Guernsey eru starvsfólk, og er talan um óløntar nevndarsessir, sum eru partur av dagliga arbeiðinum, sum viðkomandi nevndarlimur hevur í samtakinum. |
| **31:59** | Upplestur: "*Men Eik svarar TAKS aftur ein mánað seinni, í mai 2014, og vísir TAKS á (...) ein fyribils byrjunarjavna, dagfestur 1. oktober, tá eginpeningurin skal eitast fyri at vera oman fyri 2 milliardir krónur. Tað er sera undranarvert, at Eik í hesum førinum velur at vísa á ein fyrbils byrjunarjavna, ikki endaliga byrjunarjavnan, rætta byrjunarjavnan. Enn eina ferð tykist tað (...) at skal TAKS finna byrjunarjavnan, má TAKS sjálvt leita eftir honum í notunum til roknskapin hjá bankanum*". | Skeiv upplýsing. TAKS bað í brævi, dagfest 16. apríl 2014, m.a. um avrit av yvirtøkujavna uppgjørdan pr. 30. september 2010. TAKS bað í sama viðfangi eisini um onnur skjøl. Journalisturin ger í sendingini eina fakliga niðurstøðu um, hvør rætti byrjunarjavnin er. Sjálvur hevur journalisturin ongar førleikar at gera slíkar niðurstøður, og harumframt er talan júst í hesum brotinum um ein part av fakligu ósemjuni, sum TAKS viðger i løtuni. |
| **32:44** | Barbara Holm: "*Og tá man so vendir sær til TAKS, so fara teir lyklaupplýsingarnir ikki við*". | Skeiv upplýsing. Eitt dømi um, at ein kelda sleppur at leggja fram skeivar upplýsingar, sum ikki verða royndar í interviewstøðu. Talan er um vánaligt kelduvandni. |
| **34:23** | Upplestur: "*Í nevndarhølinum hjá Eik eru fólk errin av, hvussu tað eydnaðist at fáa TAKS at viðgera málið, sum Eik vildi. (...) Stjórin, SSJ, hevur uppiborið nógv rós fyri ikki at lata seg vika i málinum. Hansara støða hevur nú givið stóran vinning*". | Skeiv upplýsing. Í nevndarfrágreiðingini frá juni 2015 stendur einki um hesi viðurskifti. Í nevndarfrágreiðing frá 24. august 2015 stendur: "*Revisionsudvalget udtrykte tilfredshed om, at banken havde fastholdt oprindelig vurdering af, at der var tale om et skatteaktiv og ikki havde fulgt den eksterne revisions anbefaling om at se bort fra fradraget/goodwillbeløbet*". Einki stendur um, at stjórin hevði uppiborið nógv rós. Heldur einki verður nevnt um stóran vinning. |
| **35:28** | Upplestur: "*Innanhýsis grannskoðarin hjá Eik segði seg haraftrat úr starvi*". | Skeiv upplýsing. Innanhýsis grannaskoðarin er ikki farin úr Eik. Hinvegin fekk eitt starvsfólk í innanhýsis grannskoðanini boðið starvið sum innanhýsis grannskoðari í BankNordik. Starvsskiftið hjá viðkomandi hevur einki við skattamálið at gera. |

| | | |
|---|---|---|
| **40:07** | Upplestur: "Heldur enn at viðganga, at samskiftið hjá bankanum hevði verið ófullfíggjað, greiddi bankastjórin almenninginum frá málinum við enn fleiri villleiðandi frásagnum". | Skeiv upplýsing. Journalisturin ger niðurstøður um, at SSJ eigur at viðganga eitthvørt, og at SSJ villleiðir almenningin. Journalisturin tykist ikki vilja lurta yvirhøvur, og hann tekur ikki skrivliga svarið frá SSJ, dagfest 17. mai 2016, við í sendingina. |
| **40:50** | Upplestur: "*Men frásøgnin hjá SSJ (...) samsvarar ikki við veruleikan.*" | Skeiv upplýsing. Tó at upprit frá grannaskoðaranum lógu í málinum, so var tað ikki fyrrr enn í januar 2016, at grannskoðarin setti seg ímóti at skriva undir ársroknskapin. Uppritini frá KPMG, SPEKT og Deloitte eru ikki avgerðir, men metingar undir viðgerðini av málinum. |
| **41:19** | Hugsanir hjá KPMG, SPEKT og Jørn A. Hansen verða umrøddar og nøvn koma á skíggjan. | Ójavnvág í viðgerðini. Einki verður nevnt um uppritið frá Deloitte, sum inniheldur øvugtu niðurstøðu, og sum journalisturin hevur fingið innilit í. |
| **43:04** | "*At Eik hevði villleitt bæði skattamyndugleikarnar og í fleiri umførum almenningin dagarnar fram til 21. apríl var tí greitt, tá aðalfundur var hjá eigaranum av Eik, TF Holding*". | Skeiv upplýsing. Niðurstøða uttan skjalprógv. Eik hevur eftir bestu sannføring greitt frá málinum, og hevur ikki villleitt skattamyndugleikar ella almenningin. |
| **47:28** | Upplestur: "*Men skulu vanligu reglurnar galda tykjast einans vera tvær møguligar lagnur fyri skattamálið hjá Eik. Antin letur TAKS bankan sleppa undan at rinda skatt tey næstu árini, ella fær ákæruvaldið skattamálið.*" | Sendingin kemur her til eina endaliga niðurstøðu, sum er sera tyngjandi fyri Eik og leiðslu bankans. Journalisturin hevur uttan haldgott grundarlag sátt iva um, hvørt leiðslan hevur gjørt eitthvørt revsivert. Journalisturin dugir ikki at síggja nakran millumveg ímillum avgerðina hjá TAKS og tað revsiverda. Hesa niðurstøðu kemur sendingin til uttan eina fakliga viðgerð av málinum við veikum keldugrundarlagi. Tað er sera átaluvert, og málið eigur at verða lýst við størri javnvág. |
| **44:37-46:15 og 48:17-48:22** | Jagstran: Í tilsamans 1 minutt og 43 sekund jagstrar journalisturin bankastjóran. | 1 minuttur og 43 sekund er lang tíð í sjónvarpi. Hesa tíðina í endanum á sendingini jagstrar journalisturin bankastjóran. Hetta fer fram, hóast stjórin væl og virðiliga hevur grundgivið fyri ikki at luttaka í upptøkum í sendingini, og tó at stjórin sambært avtalu við journalistin skrivliga hevur svarað spurningum frá journalistinum. Meginpartin av hesum svarum brúkar journalisturin ikki í sendingini, hóast svarini eru sera viðkomandi fyri sjónarmiðini og uppáhaldini, sum verða løgd fram í sendingini. Óvirðiligur og óprofessionellur atburður. |

| | | |
|---|---|---|
| **48:29** | Á skíggjanum: Súni Schwarts Jacobsen vildi ikki gera samrøðu til sendingina. | Einki verður nevnt um, at SSJ skrivliga hevur svarað 17 spurningum frá journalistinum. Tað er hendan avtalan um skrivlig svar, sum er galdandi í viðurskiftunum millum journalistin og bankastjóran í hesi sendingini, og tí eigur tað sjálvsagt at verða nevnt í hesum viðfangi. |

**Samanumtøka**
Bæði sambært fjølmiðlasiðvenju og fjølmiðlaløgfrøði er tað ein megingregla, at dokumentatión krevst, tá tíðindafólk seta fram uppáhald, sum standa eftir sum ein sannroyndur veruleiki. Tess grovari skuldsetingarnar eru, tess størri eru krøvini til dokumentatión. Upplýsingar, sum kunnu vera skaðandi fyri ein persón – tað veri seg fysiskan ella løgfrøðiligan persón – skulu eftirkannast serliga væl.

Kringvarp Føroya hevur brotið hesar meginreglur í sendingini, "Skattamálið", soleiðis sum eisini er víst á í gjøgnumgongdini av sendingini omanfyri.

Samanumtikið hava journalisturin og Kringvarp Føroya brotið punktini 1.2, 3.2, 4.1 og 4.12 í reglunum um góðan fjølmiðlasið:

- **Fjølmiðlar eiga at viðgera samfelagslig mál kritiskt.**
- **Fjølmiðlar hava serstaka ábyrgd av, at øll viðkomandi sjónarmið verða lýst.**
- **Tað eigur at vera upplýst, hvør heimildin er.**
- **Tað er góður fjølmiðlasiður at vera vandin í valinum av heimildum og at eftirkanna, at upplýsingar frá heimildum eru rættar.**
- **Tað er góður fjølmiðlasiður at stremba eftir fjølbroytni í valinum av heimildum.**
- **Heimildarvandnið herðist, um dulnevndar heimildir verða nýttar.**
- **Tað er góður fjølmiðlasiður, at innihald og framløga eru saklig og umhugsað.**
- **Eingin ivi skal vera um, hvat eru ítøkiligar upplýsingar, og hvat eru viðmerkingar.**

**Umbøn**
Eik Banki heitir við hesum á Kringvarp Føroya um skjótast gjørligt at rætta allar skeivar upplýsingar í sendingini, "Skattamálið", og herundir alment at ásanna, at sendingin einki grundarlag hevði at leggja Eik Banka og leiðslu bankans undir at villleiða TAKS og møguliga fremja skattasvik.

Eisini verður heitt á Kringvarp Føroya um at ásanna, at viðgerðin av málinum er ósaklig, og at framferðin hjá journalistinum var óvirðilig og ikki í tráð við góðan fjølmiðlasið.

Kringvarp Føroya verður eisini biðið um alment at geva Eik Banka og leiðslu bankans eina umbering fyri framferðina.

Rættingar, ásannanir og umbering eiga at fara fram á hóskandi staði í Kringvarpi Føroya – eitt nú Degi og Viku – soleiðis at Kringvarpið tryggjar Eik Banka, at rættingar, ásannanir og umbering í mest møguligan mun røkka einum breiðum móttakaraskara.

Vegna Eik Banka

Súni Schwartz Jacobsen
*Forstjóri*